BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

20. januar 2025
Mál: 22/22133-109
Viðgjørt: -

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-068/2024, eftir § 52a í Tingskipanini, frá Magnusi Rasmussen, løgtingsmanni, setttur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um starvsnormeringar hjá námsfrøðingum í serflokkum í fólkaskúlanum.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv tað vildi kostað mánaðarliga at sett námsfrøðingar í føstum starvi, sum arbeiða í serlokkum í fólkaskúlanum, í fult starv við setanarbroti á 1,0?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rímiligt, at fast settir námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum hava lægri setanarbrot samanborið við líknandi námsfrøðingar á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum?

3. Kann landsstýrismaðurin greiða frá og grundgeva fyri, hví setanarbrotið hjá námsfrøðingum í serflokkum í fólkaskúlanum er væl lægri enn setanarbrotið hjá námsfrøðingum á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum, tá talan er um serbreytir í báðum førum?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa viðurskiftini soleiðis, at námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum verða settir í fult starv við einum setanarbroti á 1,0 og fáa eins setanarviðurskifti, sum námsfrøðingarnir, sum virka á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum?

Svar

Til 1: Í verandi skipan við serflokkum verður ein normeringslykil brúktur, har tað er 1 starvsfólk til hvørji 3 børn. Og setanin millum lærarar og námsfrøðingar er 50/50. Tó við teirri tillaging, at lærarar eru settir við broti 1,0 og námsfrøðingar við broti 0,85.

Tað eru í løtuni 38 námsfrøðingar í føstum starvi í sertilboðum í fólkaskúlanum. Skuldu allir námsfrøðingar í føstum starvi eftir hesum normeringslykli verið settir við broti 1,0, hevði tað kostað uml. 2,7 mió. kr. árliga eyka.

Ein annar møguleiki er at hækka brotið hjá námsfrøðingum í føstum starvi og lækka talið av námsfrøðingum í tíðaravmarkaðum starvi. Tað kann gerast innanfyri somu samlaðu játtan, men hevði merkt, at samlaða starvsfólkatalið lækkaði.

Til 2: Setanarbrotið tekur støði í galdandi ásetingum á økinum, sjá svar til spurning 3. Fyri at eftirkanna í hvønn mun talan er um eitt rímiligt setanarbrot, er arbeiði sett í gongd at lýsa hetta nærri, sjá svar til spurning 4.

Til 3: Námsfrøðingar í sertilboðum í fólkaskúlanum hava avmarkaðar undirvísingarligar uppgávur grundað á løgtingslóg nr. 125 frá 1997 við seinni broytingum, har tað í § 35 verður ásett:

"Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla, Fróðskaparsetri Føroya ella donskum læraraskúla sbr. stk. 2-5 ella aðra læraraútbúgving á sama støði, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent."

Á serøkinum verður i kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 víðari víst á arbeiðsbýtið millum lærarar og námsfrøðingar, har tað í grein 14 verður ásett:

***"§ 14.** Lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk, og námsfrøðingar kunnu røkja sernámsfrøðiligar stuðulsuppgávur sbrt. § 1."*

Tilsvarandi ásetingar á miðnámi eru øðrvísi og ikki á sama hátt avmarkandi viðvíkjandi uppgávubýti millum fakbólkarnar, sum starvast á økinum.

Ein upprøðfesting í setanarbroti hjá námsfrøðingum eigur at taka støði í lóg og kunngerð, sum av tí sama mugu tillagast samsvarandi, so arbeiðbýtið millum lærarar og námsfrøðingar verður tillagað og meiri javnsett enn talan er um nú í fólkaskúlanum.

Á miðnámi eru serbreytir skipaðar við heimild í løgtingslóg nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, sum broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2015, í § 2, stk. 6 og § 17, stk. 5 í løgtingslóg nr. 41 frá 23. apríl 1999 um støðisútbúgving innan tøkni, sum broytt við løgtingslóg nr. 35 frá 30. apríl 2015 og í § 2, stk. 5 og § 17, stk. 6 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 15. mai 2014.

Námsfrøðingar og lærarar á serliga skipaðum skúlatilboði á miðnámi arbeiða mest sum altíð burturav á serliga skipaða skúlatilboðnum.

Námsfrøðingar og lærarar í serliga skipaðum skúlatilboði hava førleikakrøv, ið eru lýst í kunngerð nr. 36 frá 4. apríl 2017. Útbúgvingarkrøvini til starvsfólk á serbreytini er námsfrøðilig útbúgving, eitt nú læraraútbúgving, námsfrøðingaútbúgving ella hægri útbúgving innan sernámsfrøðiliga økið og hóskandi yrkisfakligar førleikar. Orsakað av staðseting og heimild eru starvsfólkini á miðnámi lønt eftir sáttmálum hjá Føroya Tekniska Lærarafelag og Yrkisfelagnum Miðnám.

Serliga skipaða skúlatilboðið er ætlað teimum næmingum, sum ikki megna at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast teir stuðulsmøguleikar, sum eru í vanligu skúlaskipanini.

Til 4: Arbeitt verður í løtuni við at greina økið nærri og hyggja at møguleikum og fortreytum, sum skulu til, um setanarbrotið hjá námsfrøðingum í føstum starvi skulu hava setanarbrot á 1,0. Umráðandi er, at allir viðkomandi partar verða tiknir við, áðrenn møguligar tillagingar ella broytingar verða gjørdar á økinum.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður